MARKAMÓTSNEVNDIN

Almanna- og mentamálaráðið

Dagfest 1. november 2024

Avgerð viðv. liðugtviðgjørdum borgara á sjúkrahúsi

Sjúkrahúsverkið heitti við skrivi dagfest 5. juni 2024 á Markamótsnevndina um at taka støðu til, hvør eigur ábyrgdina av einum borgara, sum liggur á sjúkrahúsi, men er liðugtviðgjørdur. Borgarin hevði sum er onki heim at fara í tí húsini har borgarin hevði búð vóru seld. Sjúkrahúsið hevði verið í sambandi við kommunala samstarvið, tí borgarin er yvir fólkapensjónsaldur, og við Almannaverkið um manglandi bústað.

Markamótsnevndin hevði fund um málið 25. juni 2024, men metti tá, at hóast sjúkrahúsverkið, sum útgangsstøði, ikki kann leggja mál fyri Markamótsnevndina, so varð neyðugt við fleiri upplýsingum frá pørtunum, fyri at meta um, um talan er um eitt mál, sum Markamótsnevndin kann taka støðu til. Sjúkrahúsverkið, kommunala samstarvið og Almannaverkið vóru tí biðin um at lýsa málið frá teirra sjónarhorni.

Markamótsnevndin bað sjúkrahúsverkið um eina dagførda heilsulýsing av borgaranum og um eina meting av førleikunum hjá borgaranum, til at røkta seg sjálvan.
Eisini bað Markamótsnevndin kommunala samstarvið um koma við einari grundgeving fyri grundarlagnum undir teirra útsøgn um, at borgarin ikki hoyrir til teirra málbólk. Samstundis bað Markamótsnevndin um eina dagførda lýsing av støðuni hjá borgaranum í mun til visitering til kommunala samstarvið.
Markamótsnevndin bað Almannaverkið um, umframt, at lýsa málið frá teirra sjónarhorni um at grundgeva fyri hví Almannaverkið ikki metir, at borgarin hoyrir heima hjá Almannaverkinum.

Kommunala samstarvið vísir á, at vanliga fatanin ofta er, at eldraøkið hevur ábyrgd av øllum tænastum til borgarar eldri enn 67 ár, meðan Almannaverkið hevur ábyrgdina av øllum tænastum til borgarar yngri enn 67 ár. Kommunala samstarvið tilskilar, at eldraøkið og Almannaverkið hava ábyrgd av fleiri tænastum, sum ikki eru tongdar at aldri. Somuleiðis vísir kommunala samstarvið á, at ábyrgd um bústað fellur uttan fyri lóg um heimatænastu og eldrarøkt, meðan § 45, § 46 og § 47 um bústaðir í lógini um almannatrygd og tænastur ikki er avmarkað til ávísan aldur.

Almannaverkið vísir hinvegin á, at sambært viðmerkingunum til § 45 um fyribils bústað og § 46 um vardan bústað, so skal borgari, sum er fólkapensjónistur og ikki áður hevur fingið bústað sambært lógini um almannatrygd og tænastur, fáa pláss á ellis- og røktarheimi ella eldrasambýli í nærumhvørvinum eins og onnur, tá tey gerast røktarkrevjandi. Harafturat vísir Almannaverkið á, at í viðmerkingunum til § 46 stendur, at ein persónur ikki kann fáa tillutað vardan bústað, um viðkomandi er fólkapensjónistur.

Markamótsnevndin viðgjørdi á fundi 7. august 2024 spurningin um, hvør hevur ábyrgd av at veita búpláss/tænastu til ein borgara, sum liggur á sjúkrahúsi. Út frá tilfarinum, sum Markamótsnevndin

hevur fingið frá pørtunum, er nevndin komin til ta niðurstøðu, at talan er um ein heimloysis trupulleika og ikki ein trupulleika millum geirar og verður tí mett, at Markamótsnevndin ikki hevur heimild at taka støðu til hendan spurning.

Eftir verandi lóggávu hava borgarar ikki rættarkrav uppá búpláss til ávísa tíð. Heldur ikki áleggur nøkur lóg kommunum skyldu at rinda fyri tað búpláss ella uppihald, sum borgararnir hava í bíðistøðu hjá øðrum stovnum o.l. Markamótsnevndin viðmerkir, at tað er ein politiskur spurningur um aðrir geirar innan vælferðarøkið skulu áleggjast gjaldsskyldu um so er, at hóskandi búpláss ikki er tøkt eftir at sjúkahúsviðgerðin er liðug.

Anna Dam, forkvinna

Jan Sjóstein

Katrin Danielsen